

Direktør Jørgin Gunnarsen viser en af de flotte havreruder, der nu prismæssigt er blevet hverdagsmad til en kilopris på mellem 50 og 60 kroner. Prisfaldet skyldes en stor import fra Canada til lave priser. Foto: Steen Jacobsen

## Luksusfisk til rabatpris

Priserne på havreruder holdt i bund. Derfor sender Sejerø Havbrug sine fisk på markedet til lavpris. Firmaet sætter en halv million på at gøre arred til hverdagsmad. »Hellere det end død,« siger direktør Jørgin Gunnarsen.

Af Lis Lipschütz

300 ton havreruder svømmer rundt i to store bure i Sejerbugten og ånd, de er sultne.

Det var de også, indtil et voldsomt prisfald gjorde havreruden til en genstand, der mindelig fisk på linie med torsk og rødspætter. På grund af dollarfaldet overvejrer det europæiske marked af billige canadiske havreruder. Størstedig har Tyskland indført en høj gør forbyder, at noget ærød må sælges under [illegible] ikke. Det gør [illegible]

[illegible] holdere vil have en rigtig pris.

Derfor er de danske havbrugsfirmaer kommet i knibe. Det har fået Sejerø Havbrug til at sænke sine priser på markeder til [illegible]. Hvor prisen før lå på 80 kroner for 1 kg, er den nu kun 50 kroner, bliver for lille, siger direktør Jørgin Gunnarsen fra havbruget på Sejerø. Havbruget regner med at indtægterne på en halv million på en kampagne. De første dage har givet et mærkelig på omkring to ton om dagen.

Og mens indgerne går helt omkring salget, svømmer de mange havreruder rundt i deres bure og er lignede. De har tre biologer som bysidere, indtil den dag, hvor båden »Sejerø Ørn« kommer og henter dem. Men til er ørnebåden også kørt, fordi [illegible]

»Vi har valgt ikke at spille død,« siger direktør Jørgin Gunnarsen fra havbruget på Sejerø. Havbruget regner med at indtægterne på en halv million på en kampagne. De første dage har givet et mærkelig på omkring to ton om dagen.

Og mens indgerne går helt omkring salget, svømmer de mange havreruder rundt i deres bure og er lignede. De har tre biologer som bysidere, indtil den dag, hvor båden »Sejerø Ørn« kommer og henter dem. Men til er ørnebåden også kørt, fordi [illegible]

Fem dage før havreruderne bestes ind, får de ingen mad. Her klargøres nye maldebøre, der skal begrænse vandskiftet fra kilometer fra Sejerø.

# Føroyskir alarar í Danmark í trupulleikum

*Sejerø Havbrug inntøkumiss upp á 2,5 mill. kr. skrivar Berlingske Tidende.*

Tað er ikki bert í Føroyum, at føroyskir alarar eru í trupulleikum, nú prísurin á alifiski er í botni. Eisini føroyskir alarar í Danmark hava torført við at fáa endarnar at røkka saman.

Donsk bløð skriva í løtuni nógv um »Sejerø Havbrug«, sum fyri stóran part er figgjað við føroyskum pengum. Víst verður á, at støðan hjá alibrúkinum er alt annað enn góð, tí at silaprísurin er so lágur.

Berlingske Tidende hevði stóra grein um Sejerø Havbrug friggjadagin í síðstu viku.

Alistøðin skal til at drepa tilsamans 300 tons av silum í ár. Miðað hevur verið ímóti at fáa 80 kr. fyri kilo, men nú støðan á marknaðinum er heilt broytt, m.a. tí at nógvur bíligur kanadiskur alifiskur kemur inn á europeiska marknaðin, so er silaprísurin sambart Berlingaranum á 50-60 kr.

Hetta hevur gjørt, at Sejerø Havbrug nú selur sílini fyri dumpingprísir, skrivar blaðið.

Sejerø Havbrug hevur avtalað við handlarnar, ið keypa sílini, at teir skulu ikki taka nakran vinning um somu tíð sum teir fáa 500 kr. í lumman sum tilskot til lýsingar.


— Vit hava gjørt av ikki at spæla deyðir, sigur Jørgin Gunnarson, stjóri á Sejerø Havbrug við Berlingaran. Hann sigur, at teir rokna við at fáa ein inntøkumiss uppá 2,5 mill. kr. Men fyri at fáa nakað av peninginum inn aftur, so hava teir avgjørt at brúka eina mill. kr. til eina kampanju fyri at fáa fólk at keypa síl.

Á alistøðini starvast tveir biologar og triggir fiskimenn. Tá fiskurin verður dripin og reinsaður, eru umleið 25 fólk í arbeiði.

Teir hava tveir aliringar av tí stóra japanska Bridgestone slagnum, ið liggja 5 kilometrar úr landi. Í mai vórðu 130.000 silayngul koyrd í ringarnar, og viga tey longu fleiri kilo.

Tað er ikki ætlanin at gevast. Sejerø Havbrug ætlar at halda fram, hóast tað hevur verið ein vánalig forrætning í ár, skrivar Berlingske Tidende.

jan



*Verkfrøðingafelagið:*

# Vinnu- og yrkisskúlar eftir vinnulívsins tørvi

Leygardagin 29. november helt Føroya Verkfrøðingafelag sín árliga aðalfund á Hotel Borg.

Føroya Verkfrøðingafelag er eitt áhugafelag við skjótt 20 árum á baki.

Í felagnum eru sivil-, akademi- og teknikumverkfrøðingar, uml. 150 í tali.

### Endamál felagsins

Endamálið er at taka sær av áhugamálum limanna: at halda við líka og økja um teknisku og mentanarligu útbúgvingina, lønar-, setanar- og arbeiðsviðurskiftum og virka fyri góðum starvsbrøðraligum viðurskiftum limanna millum.

### Skipan

Felagið skipar seg við einum 5-mannastýri. Í stýrinum sita:
Árni Joensen, formaður, Hilmar Jacobsen, næstformaður, Søren Joensen, skrivari og kassameistari, Jan á Argjaboða og Jógvan Hammer, stýrislimir.

Eykalimir eru Súni Petersen og Johan Poulsen.

Á aðalfundinum stóðu Árni Joensen og Hilmar Jacobsen fyri vali, og báðir vórðu afturvaldir.

### Avgreiðsluskrivstova

Felagið hevur avgreiðsluskrivstovu í Tvørgøtu 29, í húsum Havnar Handverksmeistarafelags, og skrivstovan er opin mánadag og hósdag frá kl. 16 til 18 — tlf. 14826. Skrivstovufólk er sett teir hálvar dagar um vikuna.

### Skeið og fyrilestrar

Í komandi ári fer stýrið at virka fyri, at hildin verða skeið, men ætlanin er eisini at skipa fyri innanfelags og almennum fyrilestrum um teknisk og samfelagslig viðurskifti. Eingin ivi er um, at felagið hevur limir, ið megna at viðgera ymiskar aktuellar spurningar av áhuga fyri limir og almenningin.

### Blaðútgáva

Ásannandi, at vantandi kunnleiki er til arbeiðsøki verkfrøðinganna og tann týdning, hetta hevur fyri samfelagsútviklingin, fer felagið m.a. at taka upp aftur blaðútgávu, har aktuellir spurningar kunnu verða viðgjørdir á sakligan hátt.

### Útbúgvingarmøguleikar í Føroyum

Nú veruligar ætlanir fyriliggja um at útbyggja vinnu- og yrkisskúlarnar, er hetta bert at fegnast um. Tað er tó sera umráðandi, tá ið slíkar útbúgvingar verða settar á stovn, at roynt verður at geva teimum rætta innihaldið í mun til okkara samfelagsskipan og vinnulívsins tørv.

Verkfrøðingafelagið er sinnað at stuðla hesum ætlanum.

### Lønarviðurskifti

Síðan 1978 hevur FVF gjørt lønarsáttmála við Føroya landsstýri. Sáttmálaskeiðið er tvey ár, og fer galdandi sáttmáli úr gildi 1. juni 1987.

Samráðingar um nýggjan sáttmála skulu sostatt byrja fyrst í komandi ári.

Vit mugu ásanna, at lønin, sum verkfrøðingur í almennum starvi fær, er út av lági vánalig.

Gongdin seinnu árini hevur verið tann, at so at siga eingin reallønarvøkstur hevur verið. Tað, sum hevur gjørt, at flest allir aðrri lønarbólkar hava yvirlivað, nevniliga yvirtíðarlønin, hava verkfrøðingar ongan møguleika at bjarga sær við. Sømdir fyri útíðararbeiði eru ongar. Hóast arbeiðið til tíðir krevur, at ein bæði er til at taka og arbeiðir yvir, fæst hvørki tiltøkuviðbót ella yvirtíðarløn. Í staðin stendur honum í boði at »avspadsera«, men hetta letur seg aloftast heldur ikki gera, tí almennu arbeiðsplássunum vantar skikkaða arbeiðskraft.

Tann vánaliga lønin og setanartreytirnar bera sjálvsagt við sær trupulleikar á teknisku umsitingini hjá landinum, men eisini kommunurnar kring landið kenna seg kroystar.

FVF vónar, at sitandi landsstýri ger sær greitt, hvønn veg tað ber, og kennir sína vitjanartíð.,

FVF takkar fyrst øllum limm fyri skjótt farna árið og ynskir teimum eitt gott komandi ár.

Øllum samhugafeløgum, stovnum og virkjum í Føroyum takka vit somuleiðis fyri tað farna og vónai komandi ári at fáa í lag gott samstarv um eitt og hvørt tiltak av felags áhuga.

*Gott nýggjár*
*Vegna*
*Føroya Verkfrøðingafelag*

**Árni Joensen**, formaður

